# Hús brunnu í grund



*Eldurin stóð himmal høgur yvir gomlu sethúsunum í Rættará. Tíbetur var stilli, so eldur gjørdi bert smávegis skaða á grannahúsinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Húsini stóðu ikki at bjarga, og eldurin stóð út gjøgnum so at siga øll vindeyguni í húsinum*
*Mynd: Ávlur Haraldsen*



*Gomlu vindeyguni í katólsku kirkjuni, Bauers Húsum, fór fyri skeyti. Tey eru frá næstsíðstu øld og vóru sermerkt fyri húsini*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Gomlu húsini í Sigmundargøtu 24 í Havn stóðu ikki til at bjarga, tá eldur kom í tey mánanáttina. Kriminaldeildin hjá løgregluni kannar nú málið og hevur sent boð eftir fólki frá kriminalteknisku deildini hjá ríkispolitiovastanum at koma at gera kanningar. Møguliga er illgruni um, at eldurin varð ásettur**

ELDSBRUNI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tað var um tveytíðina mánanáttina, at fólk varnaðust nógvan og tjúkkan royk koma frá húsunum í Sigmundargøtu 24 í Havn. Sløkkiliðið varð boðsent, men húsini stóðu ikki til at bjarga. Alt brann innan úr teimum.

Tey trý vindeyguni úr gomlu katólikkakirkjuni, Bauers Húsum, sum hava sermerkt hesi húsini, eru nú farin fyri skjeyti. Har var onki at gera. Eldurin hevði húsini í sínum valdi, og tey brunnu í grund.

Tað verður mett at vera sera heppið, at ongin vindur var hesa náttina, serliga tá hugsað verður um nógva vindin, sum annars hevur verið um nýggjárið.Talan kundi tá havt verðið um nógv størri og meiri umfatandi skaða. Eldurin var so mikið stórur, og tað var torført at fáa tamarhald á honum, so um vindur hevði verið, so er ikki ilt at ímynda sær, at onkur av húsunum, sum standa so nær við, eisini kundu havt fingið skaða av eldsbrunanum. Serliga grannahúsini, har seks íbúðir eru í, standa tætt við. Ikki meira enn einar tríggjar metrar frá húsunum, sum brunnu í grund.

Harafturat noyddust grannarnir út gjøgnum vindeyguni, tí tað var ikki hugsingur um at sleppa sær út gjøgnum dyrnar í nógva hitanum frá eldinum.

Húsaeigarin er ikki heima, og ongin persónsskaði stóðst av ógvusliga eldsbrunanum.

### Ásett

Kriminaldeildin hjá løgregluni kannar nú málið. Bergleif dyrnar í nógva hitanum frá eldinum. Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at tey hava sent boð eftir serfrøðingum niðrifrá at koma at gera kanningar.

– Eg fái ikki sagt so nógv um hetta málið sum nú er. Kanningar mugu gerast, sigur Bergleif.

Hann sigur tó, at løgreglan hevur tosað við grannarnar, og ein teirra sigur seg hava hoyrt fótafet uttanfyri stutt áðrenn eldurin varð fráboðaður og kundi hetta týtt uppá, at løgreglan hevur illgruna um, at eldurin varð ásettur.

Men hetta vil leiðarin á kriminaldeildini ikki koma nærri inn á, so longi ongar kanningar eru gjørdar.

– Men vit er í øllum førum øgiliga áhugað í at hoyra frá fólki, sum hava sæð eitt hvørt í hasum økinum, sigur Bergleif, sum eisini viðgongur, at tað kann tykjast løgið, at tað kemur eldur í eini hús, har ongin er býr hvønn dag.

– Eigarin hevur verið burtur í eina tíð nú, men tað kann sjálvandi hugsast, at tað er onkur, sum hevur lógliga atgongd til húsini, sigur hann.

Bergleif Brimvík veit ikki at siga við vissu, nær serfrøðingarnir koma upp at kanna málið, men tað verður ein av fyrstkomandi døgunum. Inntil tá eru húsini avsperrað.



*Nógvir sløkkiliðsmenn vóru til arbeiðis í nátt, og um fýratíðina – eftir at hava oyst húsini undir vatni í tveir tímar, hevði sløkkiliðið tamarhald á eldinum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*





# Náttúrliga frágongdin bjargar heimarøktini

**Seinastu tríggjar mánaðirnar eru fýra heimarøktarar í Vágunum uppsagdar. Orsøkin er rætt og slætt manglandi pengar, sigur Malan Helgadóttir, eftirlitskvinna og økisskrivari í Vágunum. Hon er sannførd um, at einasta orsøkin til, at støðan ikki er heilt akutt er tann náttúrliga frágongdin, sum hevur verið seinasta árið**

HEIMARØKT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Støðan kundi verið heilt hættislig á heimarøktarøkinum í Vágunum. Tí nú hevur økisskrivarin og eftirlitskvinnan Malan Helgadóttir togað í neyðbremsuna. Hon er vorðin troytt av at játtanin verður skorin ár eftir ár, og tí hevur hon tikið tey stigini, sum eru neyðug til tess at kunna halda játtanina. Og hetta gongur útyvir starvsfólkið og brúkararnar.

Fýra heimarøktarar eru sagdar úr starvi síðani seinasta heyst, og brúkarar fáa rætt og slætt at vita, at tað tíverri ber ikki til at fáa hjálp, tí ongir pengar eru til.

– Hetta er ein syndarlig støða, sum vit eru komin í, og nú ber ikki til longur, sigur Malan.

Tað er ongin tungur brúkari á bíðilistanum, sum nú er, men har eru fólk, ið tørvar hjálp á ymiskar aðrar hættir. Til dømis til reingerð.

Malan ivast ikki í, at tað er tann náttúrliga frágongdin, sum hevur verið í Sandavági og Miðvági seinasta árið, sum bjargar støðuni í fyrstu atløgu, men tað kunnu tey ikki liva við í longdini.

### Lægri støði

Uppsagnirnar hava við sær, at heimarøktin í Vágunum ongantíð kemur uppaftur á tað støðið, sum hon var á fyrr í summar.

Heimarøktararnir hava í fleiri ár nú fingið størri og størri arbeiðsbyrðu, tí tær skulu gera meira við minni tíð, at tað ber ikki til at leggja meira á herðarnar á teimum. Og tí endaði tað við, at fýra heimarøktarar vórðu sagdar úr starvi, og ongin brúkari verður tikin inn afturat.

Sostatt er tað ikki arbeiðsbyrðan hjá heimarøktarunum, sum økist við hesi sparingini, sum tey nú hava framt, men heldur gongur tað út yvir brúkaran.

– Eg eri troytt av at siga við fólk, at eg síggi tørvin, men eg fái onki gjørt, tí her eru ongir pengar, sigur Malan.

Hon fegnast bara um í øllum hesum, at ongin liggur á sjúkrahúsi og bíðar eftir røktarplássi.

– Tað er tað ringasta, sum kann henda.

Malan greiðir frá, at arbeiðsbyrðan innan heimarøktarøkið er ójøvn. Og hon veit, at talan er um eitt lakari tíðarskeið nú, og tískil stúrir hon fyri, hvussu tað fer at verða, tá meira kemur aftur.

### Eitt politiskt krav

Malan sigur, at hon skilir væl ótryggleikan, sum hendan sparingin hevur havt við sær, men samstundis leggur hon dent á, at tað einasta politiska kravið til heimarøktina í dag er, at játtanin skal haldast. Og tað heldur hon er nógv fyri.

– Í fleiri ár hevur Fíggjarætlanin rátt yvir hvør hevur rættindi og ikki, og tað kann ikki halda fram, tí haldi eg, at tíðin er komin, har politkarar, sum tora, skulu seta seg niður við hesum akutta málinum og lógarfesta heimarøktina, tí hetta fer bara at standa við og versna, sigur Malan, sum eisini eftirlýsir pengar, sum eru játtaðir til heimarøktina.

Hon veit, at játtanin er hækkað í fleiri ár nú, men hon sigur, at teir koma ikki út til brúkaran.

– So tað er ikki gott at vita, hvat pengarnir fara til. Gamaní, fer ein partur til lønarhækking, sum heimarøktararnir hava fingið, men tað er ikki alt, tað er púra sikkurt, sigur Malan. Hon vísir at enda á, at í Vágunum kosta 24 brúkarar, sum búgva á trimum sambýlum umleið helvtina av tí, sum 130 brúkarar úti í øki tvey, sum er Vágar/ Norðstreym kosta.

– Vit kunnu ikki liva við hesi støðuni. Okkurt má gerast og tað skjótt eisini, sigur Malan Helgadóttir at enda.

# Herverk og rúsdrekkakoyring

**Løgreglan hevur verið nógv úti um vikuskiftið í sambandi við smærri herverk og bilførarar eru eisini tiknir fyri rúsdrekkakoyring**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur ikki havt úr at gera um vikuskiftið, men boð hevur tó verið eftir teimum til fleiri smærri herverk og lítil ferðsluóhapp eisini.

Eitt herverk varð framt á bygningin, har Heimarøktin og Serforsorgin halda til, eitt annað var á ein bil. Hetta var alt fríggjakvøldið og leygarnáttina.

Sunnumorgunin tók løgreglan við stuttum millumbilum tveir bilførarar, sum koyrdi ávirkaðir í miðbýnum. Báðir verða skuldsettir fyri rúsdrekkakoyring.

Tann seinni hevði onki koyrikort frammanundan. Ein bilførari varð steðgaður á landsvegnum fyri at koyra ov skjótt. Afturfyri at koyra 122 km/t kann hann vænta sær ein treytaðan dóm upp á koyrikortið tey komandi trý árini.

### Royk luktur

Fríggjakvøldið var Sløkkiliðið boðsent út á Landssjúkrahúsið, tí tey hildu seg kenna roykluk har. Men tá sløkkiliðið kom, var ongin roykur at finna nakrastaðni. Lukturin var framvegis har, men ongin eldur var at finna. Heldur ikki varð staðfest, hvaðani lukturin kom frá.

## *Tøkk*



*Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegi okkara, tann 19. des. 2003, og gjørdu okkum dagin ógloymandi.*

*Ætt, vinum og okkara landsfólki annars, ynskja vit eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri alt tað, ið farið er.*

***Oddbjørg og Johannes Poulsen v/ familju***